út tann pening, sum hann hevði brúk fyri. Glaður um hjartað fór Andrass oman aftur til Karl á Lað, gav honum sparikassabókina, takkaði honum so hjartaliga fyri hjálpina og tað at hann hevði so stórt álit á sær, at lána sær pening uttan nakrað trygd. Andrass kundi nú lættur um hjarta gjalda fyri bátin. Hann róði út við bátinum, fiskaði væl og Karl fekk sínar pengar aftur.

## Um motorbátar

Motorbátar hava eina nokk so áhugaverda søgu, sum Robert Joensen fortelur um í síni bók um útróður. Hann sigur, at ofta hava føroyingar verið seinir í vendingini við nýhugsan, men tá ið tað snúði seg um motorbátar, vóru teir skjótir.

Tann fyrsti bátur í Íslandi fekk motor í 1902. Í Noregi vóru í 1903 bert tríggir motorbátar.

Tann fyrsti føroyski báturin til fiskiskap fekk motor í 1905 og í 1906 vóru 21 motorbátar, av hesum høvdu 12 dekk.

At fáa motor var ikki bert sum at siga tað, tí menn máttu eisini hava skil á motorum. Fyrstu tíðina hendi tað javnan, at motorbátar máttu sleipast til lands av árabátum til fragd fyri teir, sum ikki vildu vita av motorum! Men menn komu eftir hesum, og grundarlagið varð lagt fyri teimum mongu framúr motormonnunum, vit hava havt, og millum hesar eisini synir og abbasynir hjá Andrassi.

Jákup Biskupstøð í Klaksvík bygdi eisini nógvar motorbátar og er hetta ein søga fyri seg. Men her skal komast aftur til Elias í Rættará.

Hann bygdi eitt deksfar til motor í 1901 til Restorffs handilin. Hann fór síðan til Noregs at læra skipasmíð, og tá ið hann kom heim fór hann undir rættiligt skipa/bátasmíð úti í Álakeri. Hann bygdi tilsamans 135 motorbátar, og hevði upp til 25-30 mans í arbeiði. Okkurt ár bygdi hann 14 bátar. Undir fyrra heimsbardaga vóru eisini nógvir bátar bygdir til Íslands.

Um kostnaðin av hesum bátum kann aftur vísast til Robert Joensen. Í 1909 bygdi Elias í Rættará ein bát til Klaksvíkar. Hann var sjey tons og hevði 8 hk motor og kostaði 8.000 kr. Tað var nokk so nógv av peningi tá í tíðini.

## Skjótt at sigla yvirum

Tað var so stutt yvirum. Bátarnir hava gingið so mikið skjótt, at teir hava nokk ikki havt meira enn 30 tímar um ferðina. Hetta vóru deiligir bátar. Avreitt var hvønn dag, tá ið veður var. Tó var hildið heilagt sunnudagar. Manningin búði í landi í skúrum, sum teir bygdu sær.

Tað vanliga var, at Andrass fór yvir við báðum bátunum, og teir komu so heim um heystið. Men tað hendi seg eisini, at hann lat annan bátin liggja eftir í Íslandi, og tá kom eisini fyri, at hann hevði motorin á hinum bátinum heim við at umvæla.

Nógv útgerð skuldi takast við til Íslands. Sum til dømis epli, skerpikjøt, spik, kaffibønir, skipskeks og eisini torv til brenni.

Føroyingar keyptu av og á kjøt frá íslendingum. Teir keyptu eisini nógva tálg. Hon varð saltað, og teir tóku hana heim við sær. Teir keyptu eisini nógva ull. Um heystið, tá ið teir fóru heim, keyptu teir kálvar og ærseyð at hava heim við sær at seta við. Teir tóku eisini ber heim við sær sum góðgæti til børnini.

Føroyingarnir vóru væl umhildnir, og fingu nógvar vinir millum íslendingarnar. Teir fingu tað ummæli frá íslendingum, at teir vóru rættiligir menn, heiðurligir, friðsamir og ágrýtnir, aldri gjørdu teir ófrið ella vóru ikki ólátaðir í íslendskum bygdum.

## Sigldi so snórabeint uttan navigatións-útbúgving

Sum frá leið gjørdust synirnir hjá Andrassi vaksnir, og tá kundu teir manna báðar bátarnar.

Andrass var ikki útbúgving navigatørur. Men tá ið hann fór avstað úr Føroyum setti hann kós úr Eiðiskolli úr einum ávísum ýti, og hann kom altíð rætt fram bert við hjálp av kumpass. Sonurin Andrias helt hetta ikki vera nóg trygt, so einaferð varð avrátt, at nú skuldu báðir bátarnir hjá teimum vera í fylgi við einum báti úr Vík, sum hevði navigatør umborð. Andrass ger beinanvegin vart við, tá ið kósin varð sett, at hetta var kósin á Suðurlandið og ikki á Eysturlandið.

Teir komu eisini inn á íslendska landgrunnin nógv syðri enn ætlað, og var hetta í tjúkkum mjørka. Men tá tók Andrass kommandoina á bátunum. Teir sigldu norður eftir í fleiri tímar uttan at síggja fram um stavn, og hjá sær hevði Andrass bert kumpass og klokku. Knappliga leggur Andrass róðrið í annað borðið og tekur frá. Tá koma teir beint inn á húsið ella skúrin hjá teimum á Seyðisfirði!

Tey fyrstu árini, áðrenn teir fóru at rógva við motori, plagdi abbi at rógva út frá Borgarfjørði, sum er nakað norðanfyri Seyðisfjørðin, og tað er frá hesi tíðini søgan hjá Símun Johan stavar.

Seinni varð tað frá einum plássi á norðara arminum á Seyðisfirði, sum kallast Brimnes. Síðan var tað á Skálanesi á sunnara arminum. Aftur seinni var tað á Hafnesstøðum, innanfyri Skálanes, sum var í bygdini á Seyðisfirði.

Her høvdu teir bygt sær ein skúr, har teir búðu. Tað var eingin brúgv til bátin at leggja at, so teir máttu føra fiskin í land við lítlum báti. Síðan var fiskurin flaktur og saltaður úti. Tann lidni saltfiskurin varð seldur til norska keypmannin Wathne, sum var ein av stóru vinnulívsmonnunum á Eysturlandinum í teirri tíðini. Í dagbókini hjá Petur Alberg, sum hevur verið prentað í Sosialinum herfyri, varð greitt frá, at Wathne doyði knappliga í Føroyum í 1898.

Tórhallur heldur, at føroyingar hava verið óførir at klára seg undir ofta truplum umstøðum. Eisini tá ið hugsað verður um grønlandsútróðurin, har teir ofta fóru yvir á berar klettar.



Hetta er ein mynd av gøtumonnum, sum róðu út á Bakkafjørðinu í mong ár. Teir eru frá vinstru Zakarias Karl Joensen, Líggjas Hansen, kallaður Fløttur, Líggjas Husgaard, Hans Andrias Husgaard og Hans Jakku Thomsen, ættaður av Eiði. Hesir liva enn á manna munni á Bakkafjørðinum



Kirkjugarðurin í Seyðisfirði. Hetta er steinurin yvir teir, sim fórust við bátinum av Riddaranum í 1927. Skamt frá liggur Pól, beiggi Andrass grivin. Hann umkomst í 1884

## Johan hittu konu, sum hevði spælt við mammuna

Johan Petersen, Bella Johan, var í 1975 ein túr í Íslandi við einum dansifelagi. Johan er kendur fyri at duga væl at greiða frá og at duga væl at koma í samband við fólk. Ta ferðina kom hann at hitta fólk, sum skrivaðu søgu um útróðurin hjá føroyingum á Eysturlandinum. Tey høvdu avreiðingarbøkur, sum vístu tær einstøku avreiðingarnar, og her var Andrass eisini væl umboðaður, og tað sást, hvat hann hevði fiskað. Tølini vístu, at motorbátarnir hjá Andrass veiddu dupult so nógv sum róðrarbátar. Tískil hevur hetta verið ein góð íløga.

Tá kom Johan eisini at hitta eina gamla konu, sum hevði búð í Hafnesstøðum. Hon spurdi Johan, um hann kendi nakran av Eiði. Jú, mamma hansara var av Eiði, og kallaðist Mia. Ja, men so havi eg spælt við mammu tína! Henda konan mintist væl Miu, tá ið hon kom til Íslands sum smágenta saman við pápanum, mammuni og systkjum. Mia var við í tvey summar. Hon var fødd í 1899, og hetta hevur verið, áðrenn hon fór í skúla sjey ár seinni, tað vil siga fyrst í 1900 talinum. Hendan konan mintist eisini Siggu, konu Andrass, sum flakti toskin, tá ið bátarnir komu inn við fiski.

Johan vitjaði eisini á Hafnesstøðni. Grundin til skúrin hjá abbanum sást framvegis, og bátaspælið lá framvegis í fjøruni.

## Neystið hjá Andrassi stendur framvegis

Tummas hjá Emil hevur eisini serlig minni um abba sín.

Norðuri á Eiði er eitt neyst sum Andrass bygdi, sum Tummas nú eigur. Hetta neyst stóð sera ábart, og var hetta áðrenn havnalagið varð útbygt, men neystið er ikki skalað. Tað hevur í hvussu er verið bygt á klettagrund.

Tummas hevur eisini verið á floti við abbanum. Hann minnist einaferð hann sovnaði í bátinum, og omman bar hann til hús.

Á sínum gomlu døgum bygdi Andrass hús. Ein sonur var inngiftur, og hevði fingið so stóra familju, at Andrass og Sigga vildu byggja av nýggjum. Hann hevði síni hugskot, og eitt av teimum var at byggja eitt vindeyga undir køksskápinum fyri at fáa ljós inn, og var hetta sera snilt hugsað.

Tummas nevnir eisini fleiri dømi um, hvussu væl abbin var umtóktur. Tummas búði niðri eini 14 ár, og hann minnist, at hann umborð á Tjaldrinum millum lond kom at hava kamar saman við tí gamla seglmakaranum í Havn, Andreas Andreassen, sum var systkinabarn abba hansara. Tá ið hann frætti, at Tummas var abbasonur Andrass var einki mark fyri, hvussu blíður hann var. Eitt annað dømi var, tá ið hann plagdi at keypa sær saltfisk á Bacalao at taka sær niður við. Tá ið viðkomndi, sum avgreiddi søluna, frætti, at hann var abbasonur Andrass, fylti hann sekkin við fiski og fekk hann sera góða vekt.

**Komandi Miðvika**

Í komandi Miðviku verður greitt frá lívinum í Sundalagnum. Her var ofta nógv sild og nógv arbeiði av henni. Ein serlig frágreiðing verður eisini um Hans Poulsen í Svínáum, sum fór til Danmarkar at silja sild. Her virkaðu tey eisini saltfisk, og tað var gott at vera barn á Norðskála.